

Í stóru portiónshøllini kunnu tey skera 50 tons av portiónum um samdøgurið, sum so skuldi verið



Tilsamans fara eini 120 fólk at arbeiða á nýggja virkinum, seinni verður brúk fyri enn fleiri

# 120 fólk til arbeiðis á nýggjum virki í Vági



Hóast prísirnir á laksi eru lágir, stúrir Heri ikki fyri framtíðini hjá virkinum, hóast tað kostar yvir 70 milliónir

**Hóast prísurin á laksi er sera vánaligur í løtuni, stúrir Heri Hjelm ikki fyri framtíðini hjá nýggja laksavirkinum, hann hevur gjørt í Vági, saman við norðmonnum fyri góðar 70 milliónir**

VÁGUR
*Áki Bertholdsen*

Nú er aftur eitt nýtt virki latið upp í Vági. Og hetta er eitt virki av teimum stóru, tí har fara eini 120 fólk at hava sína dagligu gongd til arbeiðis.

Tað er eitt nýtt laksavirki, sum Heri Hjelm og hansara samstarvsfelagir í Pan Fish í Noregi, sum nú hava gjørt eitt stórt laksavirki í Vági undir navninum Suðurlaks.

Tey hava arbeitt á virkinum í eina tíð fyri at royna maskinurnar og nú er tað so komið hartil, at virkið varð alment tikið í nýtslu í gjár.

Tað varð gjørt við eini hátíðarløtu á virkinum á miðdegi í gjár, har almenningurin var boðin at síggja virkið, afturvið einum kaffimunni og kransakaku og onkrum søtum afturat undir tonnina.

Suðurlaks hevur leigað gamla flakavirkið Polarfrost frá Fiskavirking og gjørt tað at kalla alt samalt nýtt innan og innrættað tað til laksavirki.

Heri Hjelm sigur, at maskinurnar og útbúnaðurin annars, vísa seg at rigga so væl, at teir eru sera væl nøgdir og nú er ætlanin at seta øll segl til.

## 120 fólk til arbeiðis

Nýggja laksavirkið hjá Suðurlaks er bæði stórt og hartil ógvuliga fjølbroytt, so at tað ber til at virka ymsar vørur burturúr laksi.

– Vit hava eina velduga orku at slátra og stendur á, kunnu vit slátra útvið 300 tons um samdøgurið. Útvið 40 fólk fara at arbeiða á sláturdeildini á virkinum, sigur Heri Hjelm.

Hann sigur, at teir hava eisini tvær portiónslinjur, har tað ber til at skera 12 tons til portiónir á eini átta tíma vakt á hvørjari linju.

– Verður arbeitt sólarringin runt á báðum linjunum, kunnu vit sostatt skera upp til 50 tons av lidnari vøru, um so skuldi verið.Tað svarar til 100 tons av rundum laksi.

Á hvørjari portiónslinju fara eisini útvið 40 fólk at arbeiða, so tilsamans er talan um eitt arbeiðspláss til næstan 120 fólk.

Á virkinum er eisini útgerð til at skera fløk og at pakka tey lufttætt, so at tey antin kunnu útflytast fesk, men tað ber eisini til at frysta tey til seinni útflutning.

Men harumframt ber eisini til at frysta heilan laks.

Heri Hjelm sigur, at í vár verður flakalinjan á roykivirkinum í Porkeri eisini flutt inn á virkið í Vági og tað verður so uppaftur brúk fyri fleiri fólkum.

Tað merkir ikki, at ætlanin er at leggja Roykivirki í Porkeri stilt.

– Tá ið flakalinjan í Porkeri er flutt til Vágs, fer tað at føra við sær, at tað ber til at roykiorkuna í Porkeri, sigur Heri Hjelm.

Hann sigur, at ætlanin er, at rávøran hjá laksavirkinum skal útvegast frá teirra egnu alibrúkum í Suðuroynni.

– Vit ætla okkum at taka eini 10-15.000 tons av laksi um árið úr okkara egna alibrúkum. Men verða umstøður til tess, ber tað til at veksa um enn meiri um alingina.

Virkið hjá teimum hevur í løtuni alibrúk bæði í Lopra, í Vági, í Hovi, í Øravík og í Froðba.

Teir hava eisini søkt um loyvi at ala á Hvalbiarfirði, men enn hevur Vinnumálastýrið ikki tikið avgerð um umsóknina, tó at Hvalbiar Kommuna hevur viðmælt at ganga henni á møti.

## Sær ljósari út

Nýggja laksavirkið í Vági er ein veldug íløga, tí tað kostar yvir 70 milliónir.

Hesa seinastu tíðina hevur laksaprísurin verið út av lagi vánaligur, men kortini stúrir Heri Hjelm ikki fyri framtíðini.

– Vit eru tíbetur komnir hartil, at vit kunnu siga, at prísurin hevur verið lægri, enn hann er nú. Hann sigur sostatt, at prísurin er farin at kvinka uppeftir aftur.

– Tað eru glottar fyri framman, tí prísurin gongur aftur rætta vegin. Bjartskygnið er størri nú, enn tað hevur verið.

– Vit halda eisini, at vit eru so kappingarfør sum nakað annað virki, so vit kunnu virka laks so bíliga sum nakar. Tí óttast vit ikki fyri framtíðini, sigur Heri Hjelm.

Heri Hjelm væntar, at tað verður javnt og nógv arbeiði á virkinum.

Tað veldst eitt sindur um, hvussu marknaðurin verður. Men hann hevur rættiliga góðar vónir um, at tað fer at eydnast.

– Vit vita, at marknaðurin er til staðar. Vit kenna vøruna og duga at framleiða hana líka væl sum onnur og framleiðslan er er kappingarfør, so fortreytirnar eru avgjørt til staðar.



# Eitt nýtt kervi

**Teld og tøkni standa ovast á breddanum hjá nýggjastu KT-fyritøkuni í Føroyum, Kervi. Hóast andlitini eru kend, so verður tað talan um annað enn forritan, tá ið fyritøkan leggur seg líka nógv eftir ráðgeving v.m.**

KT
*Heri á Rógvi*



*Starvsfólkið hjá Kervi brynjar seg út at taka ímóti avbjóðingunum innan KT í Føroyum.*

*Mynd: Jens Kristan Vang*

Í hesum døgum, tá ið Føroyar nærkast einum KT-vinnupolitikki er ein nýggj føroysk KT-fyritøka sprotin upp úr nýggjum.

Fyritøkan kallast fyri Kervi. Slagorðini hjá fyritøkuni eru teld og tøkni. Men stamstundis eru teir so nógv annað enn hetta, siga teir.

Teir hava megnað at fingið í lag ein samstarvavtalu við heimsins størstu KT-fyritøku, IBM. Teir hava fingið loyvi til at kalla seg fyri IBM Business Center. Tað vil í veruleikanum siga, at teir eru at rokna sum eitt slag av einum umboð fyri IBM, har tær hava servitan innan teirra útbúnað og annað.

Kervi verður ein fyritøka av tí slagnum, sum fer at venda sær til fyritøkur og virki sum kundar. Tað er ikki ætlanin at fara undir virksemi við at selja útbúnað og annað til privatfólk, hóast hesi sjálvandi kunnu keypa loysnir frá teimum.

Jónsvein Joensen, sum er nevndarformaður fyri Kervi, sigur, at tað ber til at lýsa virksemið hjá fyritøkuni í trimum pørtum: Ráðgeving, tøkni og menning. Tað vil siga, at fyritøkan er til reiðar at bjóða annað enn bert tøkni og útbúnað. Hetta merkir, at fyritøkan vil kunna fara inn og ráðgeva fyritøkum í at skapa ein KT-politikk so at siga.

## Einki in.fo

Hóast fleiri av starvsfólkunum hava royndir við at arbeiða hjá øðrum fyritøkum, so siga teir, at her er talan um eina heilt nýggja fyritøku, sum hevur sett sær nøkur mál. Sum áður nevnt, so ætla teir, ella rættari sagt tey, at spenna teirra virksemi rættiliga víða. Samstarvið við IBM kemur at spæla ein stóran leiklut. Teir fara eisini at leggja dent á at útvikla skipanir, har tað serliga verður Lotus Notes, sum teir fara at leggja dent á.

Teir hava í øðrum høpi roynt seg við einum portali, men hesin er farin í søguna, og eingin nýggjur er á veg. Átta fólk fara at starvast hjá fyritøkuni, sum fer at halda til uppi á Hálsi, beint við Havnar Timburhandil. Tað eru fimm starvsfólk, sum eiga fyritøkuna.

# Faroesoft farið í avtøku

**KT-fyritøkan Faroesoft, sum Farodane áttu størsta partin av, er farið í avtøku. Fyritøkan var fyri stórum bakkasti, tá ið bróðurparturin av starvsfólkinum í einum søgdu seg úr starvi. Nú restar bert at bjarga umdøminum**

KT
*Heri á Rógvi*

Einaferð kallast fyritøkan fyri VIT. Síðani broyttist navnið til Faroesoft, og nú er fyritøkan heilt einfalt farin í avtøku, t.e. likvidatión. At ein fyritøkan fer á heysin er ikki nakað, sum kann kallast fyri eina stórsøgu, men tað, ið ger hesa søguna serliga er, at tað ikki eru meira enn góðir tveir mánaðir síðani, at VIT varð til Faroesoft. Samstundis hava fleiri av teimum, sum starvaðust hjá Faroesoft nú funnið saman í eina nýggja fyritøku, sum kallast fyri Kervi.

## Skiftu, skifta

Byrjanin til alt hetta finna vit í 1996, tá ið VIT verður sett á stovn. Virksemið hjá fyritøkuni er rættiliga nýtt í Føroyum, og fólk leggja eisini skjótt til merkis hesa góðu fyritøku.

Í 2000 keypti Farodane 80% av partabrøvunum í fyritøkuni. Tey írestandi 20% eiga starvsfólk á Faroesoft( VIT tá). Tað verður samstundis ført fram, at virksmemið hjá Farodane og VIT skulu sameinast til meira at gerast ein heild, og hetta merkir m.a., at skeiðvirksemið hjá báðum pørtum verður savnað á einum stað.

Í oktober 2001 verður VIT til Faroesoft. Fyritøkan hevur fingið nýtt navn og eisini varð flutt í nýggj høli. Týsdagin í hesa vikuni varð Faroesoft sett í eina prosess, sum hevði til endamáls at avtaka fyritøkuna.

## Passaðu ikki saman

Tá vit spyrja Óla Olsen og Jónsvein Joensen, sum eru við í teirri nýggju fyritøkuni, Kervi, og eisini vóru berandi kreftir hjá Faroesoft, hvussu teir vilja lýsa støðuna, er svarið hetta:

– Okkara fatanir av, hvussu ein KT-fyritøka eigur at vera var øðrvísi, og tí valdu vit at royna aðrar leiðir, siga Óli Olsen og Jónsvein Joensen.

Teir siga seg ikki vera úti eftir at skaða Farodane, men teir ásannaðu bert, at teirra ynski ikki passaðu saman við tey hjá Farodane. Teir báðir leggja dent á, at hetta ikki er nakað sum er púra óvanligt, tá ið fólk kunnu hava ymsar meiningar. Teir fara nú at leggja alla orkuna í teirra nýggja virksemi við fyritøkuni Kervi.

## Óseriøst

Jan Ziskasen, KT-stjóri fyri Farodane, hevur sína síðu at søguni. Hann greiðir frá, at teir ein dagin móttóku ein brævbjálva, har sjey av teimum ellivu starvsfólkunum hjá Faroesoft søgdu seg úr starvi. Hetta var tann 31. oktober. Áðrenn hetta høvdu teir sannað, at fyritøkan ikki gav eitt nóg stórt avkast, og teir fóru síðani farnir beinleiðis upp í umsitingina av fyritøkuna. Sambært business-line.fo, so hevur VIT havt stórt undirskot hesi seinastu tvey árini.

– Vit ætlaðu at fara inn við fleiri pengum, men hetta vildu starvsfólkini, sum áttu tey írestandi 20%, ikki. Vit settu tó fleiri pengar í, tá ið vit mettu, at hetta var nakað, sum kundi fara at kasa pengar av sær, sigur Jan Ziskasen.

Jan Ziskasen ásannar, at teir hava mist nógvar pengar orsaka av hesum, og tað hevur týdning fyri teir nú, at teir fáa møguleikan at varðveita teirra umdømi sum ein góð og seriøs fyritøka.

– Skulu vit eina góða og gevandi KT-vinnu í Føroyum, so má tílíkt ikki koma fyri. Hetta er óseriøst og skaðiligt, sigur Jan Ziskasen.

Tey starvsfólkini, sum vóru eftir hjá Faroesoft, eru flest øll farin í starv hjá Farodane.

